# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, ið við gávum, kortum, blómum og uppringingum gleddu meg á 90-ára føðingardegnum.

Takk øll tit, ið komu frá nær og fjar at halda føðingardagin saman við mær og vóru við til at gera kvøldið so hugnaligt.

**Kærar heilsur**
**Lena Niclasen, Vágur**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Olsen**
Oyrarbakka

doyði og varð jarðaður.
Tøkk til Jógvan Fríðriksson, prest, og til sangarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu so væl til við ervinum.
Eisini ein tøkk til Umlættingarheimið í Syðrugøtu og somuleiðis ein tøkk til Røktarheimið á Mørkini og til heimasjúkrasystrar.
Tøkk fyri peningagávur til Diabetisfelagið.
Hjartans tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Marianna**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sonja Tungá**
Skopun

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til tykkum øll, ið á ymiskan hátt hjáltpu til í samband við jarðarferðina, og til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**Elisa, Hildigarð, Jógvan Finnur, Jóan Jacob og Gullbrand**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum við gávum, blómum, telegrammum, uppringingum og á annan hátt gleddu meg á 90 ára føðingardegnum. Og ein hjartans tøkk til tykkum mongu, sum hildu føðingardagin saman við mær og vóru við til at gera dagin so serstakan og hugnaligan.

**Kærar heilsanir**
**Lena í Beiti, Sørvágur**

# Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum tóku lut og vístu samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma, langomma, olduromma og systir

**Rosa Elisabeth Lassen**
Vágur, ættað av Eiði
♥ 21. juli 1912 ✞ 3. aug. 2006

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólkið í Heimarøktini í Havn, á Korndalsbýlinum á Eiði, á G2 og G4 á Landssjúkrahúsinum fyri ta hjálp og umsorgan, tit veittu henni, tá henni tørvaði tað.
Tøkk til øll tykkum, sum so trúliga vitjaðu hana og hjálptu henni bæði í Vági, í Havn og á Eiði.
Tøkk til prestarnar Bjarna Bæk og Patrick de Neergaard fyri góð og troystarrík orð í Kapellinum og í Vágs kirkju.
Tøkk til organistar, sangarar, berarar, gravarar og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað á fold.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og gávur til Korndalsbýlið.

*Fyri tey avvarðandi*
**Børnini**

*Eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan. Fil. 4,13*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Pethur G. Petersen**
(vanliga nevndur Pethur í Puntabyrgi)
Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi og á G1 á Landssjúkrahúsinum.
Takk til Hera Kjærbo, Alfred Petersen og Jónsvein Bech fyri troystarrík orð. Til sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri vitjanir, uppringingar, heilsanir, blómur, kransar, peningagávur og til øll, ið hjálptu til á annan hátt.
Tøkk til tykkum, ið vóru í kapellinum í Havn, tykkum, ið vóru á kajuni, tá vit komu suður og tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Kirsten, Niels Gunnar, Mina, Einar og Dion**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Berlina Óluva Sólsker**
fødd Ejdesgård,
ættað av Eiði, búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 20. august, 76 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikukvøldið 23. august kl. 18.00 og jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Børnini við familju**

†

Okkara kæra mamma, vermanna, omma og langomma

**Anna K. Madsen**
Kvívík

andaðist á Eldrasambýlinum í Kollafirði leygardagin 19. august, 91 ára gomul.

Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00 úr Kvívíkar kirkju.

*Vegna tey avvarðandi*
**Ingibjartur, Asbjørn, Gullak, Ása og Árni**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Theodor F. Eliasen**
Leirvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 19. august, 85 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Hebron í Leirvík mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Elisabeth**
**Jón, Korinta, Tummas, Sigrun og Eydna**

*Tey, ið ynskja at minnast Theodor, kunnu senda eina gávu til Akurin, konto í peningastovninum.*

**Dagurin í morgin**
**23. august. Sakeus**, deyður umleið ár 116. Í elsta listanum yvir biskupar í Jerúsalem verður nevndur ein Sakeus, sum er tann fjórði í tí biskupatalinum, men annars ókendur. Summir halda, at her verður sipað til yvirtollaran Sakeus (Luk. 19, 1-6). Navnið merkir reinur ella sakleysur.